# Ársfrágreiðing

# 2012

NORÐOYATUNNILIN

**19. mars 2013**

# Frágreiðing
# til aðalfundin 19. mars 2013

**(fyri árið 2012)**

## 1. Nevndin og felagið

Nevndin hevur í 2012 havt 6 fundir.

Á seinasta aðalfundi vóru allir 4 nevndarlimirnir afturvaldir. Í nevndina vóru afturvald: Bergur í Garði, Jens Kári Vilhelm, Johanna á Bergi og Heri M. Hammer. Nevndin skipaði seg við Bergur í Garði sum formanni og Jens Kára Vilhelm sum næstformanni.

Leygardagin 26 maj andaðist Bergur í Garði , 55 ára gamal. Heilsan var ta seinastu tíðina rættiliga farin at bila.

Seinastu árini hevði Bergur fleiri ferðir verið illa sjúkur av krabba. Stutt undan jólum 2010 fingu Bergur og familjan tey tungu boðini, at seinasta viðgerðin ikki hevði hjálpt, og sum støðan var, kundu læknarnir ikki gera meir.

Tað verður stórur saknur í honum og hansara oftani beinraknu viðmerkingum og analysum, fyri ikki at tala um hansara lætta, vinsæla lyndi og verumáta. Tað verður fátæksligari í nevndunum fyri tunnilsfeløgini, at verða hann fyriuttan. Eftir hava vit tó góðu minnini um henda so dámliga mann og tað nógva góða, hann hevur lagt eftir seg, og sum vit kunnu bera víðari í okkara felags arbeiði.

Bergur er farin, og vit í Norðoyatunlinum og Vágatunlinum minnast Bergur við tøkk, fyri ta tíð hann var ímillum okkum og okkara tankar og samhugi fer til tey, sum við Bergi hava mist mann, pápa og bróður.

Vit lýsa frið yvir minnið um Bergur í Garði.

Nevndin skipaði seg av nýggjum við Jens Kára Vilhelm sum nevndarfoformanni og Hera M. Hammer sum næstformanni.

Felagið hevur skrivstovu í leigaðum hølum á Hoyvíksvegi 65.

Raksturin er skipaður í samstarvi við P/F Vágatunnilin, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Einans nevnd og stjóri eru sett í felagnum. Øll onnur starvsfólk verða nýtt í samstarvi við P/F Vágatunnilin. Allur tekniskur rakstur er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur.

Umsetningurin var í 2012 25,9 mió. kr. og er hetta 0,6 mió. kr. meira enn fíggjarætlanin, sum varð løgd fyri 2012. Av rakstrinum fóru m.a. 2,7 mió. kr. til rakstur av tunli og vegum, 2,3 mió. kr. til innkrevjing og fyrisiting. 0,5 mió. kr. til tryggingar, 2 mió. kr. til el, 11,2 mió. kr. til avskrivingar og 3,3 mió. kr. til rentur.

Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á 3,8 mió. kr., sum er 0,7 mió. kr. lakari enn árið fyri.

## 2. Virksemið

Endamálið hjá felagnum er smb. viðtøkunum fyri felagið og løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð, at útvega fast samband millum Eysturoy og Norðoyggjar, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Í §1 í løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð stendur:

Rættur til tunnilsgerð og eftirlit

§ 1. P/F Norðoyatunnilin, stovnað við heimild í løgtingslóg nr. 168 frá 21. desember 2001 um stovnan av partafelagi at gera fast samband um Leirvíksfjørð, fær rætt til vega- og tunnilsgerð millum Eysturoy og Borðoy og ognarrætt til lidna tunnilin við tilhoyrandi vegi.

*Stk. 2.* Landsverkfrøðingsstovnurin skal undir ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum góðkenna tunnilsverkætlanina, herundir vega- og tunnilsgerðina, áðrenn tunnilsarbeiðið verður sett í verk, og skipar í hesum sambandi fyri eftirliti við, at verkætlanin verður framd samsvarandi góðkendu ætlanini. Tá neyðugar forkanningar og prosjektering eru gjørdar og í seinasta lagi 4. apríl 2006, skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot til løgtingslóg um ein tunnil undir ella eina vegføring fram við Leirvík.

*Stk. 3.* Tá útveganarkostnaðurin er fult afturgoldin, og P/F Norðoyatunnilin stendur sum eigari, verður alt anleggið uttan viðurlag avhendað landinum til ognar.

Í høvuðsheitunum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

## 2.1 Tunnilsarbeiðið

Nógv av vanliga viðlíkahaldinum av tunlinum liggur í føstum skipanum, og tænastusáttmálar eru gjørdir við fleiri fyritøkur um ymsar tænastur, t.d. viðv. el-innstallatiónunum, pumpuskipanini, gjaldsstøðini, reingerð av tunlinum, dagligum eftirliti í tunlinum v.m.

Norðoyatunnilin hevði ábyrgd av at taka arbeiðsvegin burtur, sum bleiv nýttur í sambandi við tunnils-arbeiðið og sum lá gjøgnum fjøruna í Leirvík, og fjøran skuldi endurskapast til upprunaligan stand. Eisini átti Norðoyatunnilin eina stóra grótrúgvu, sum lá á einum øki hjá Eysturkommunu niðri á Kráartanga. Í sambandi við nýggja vegin gjøgnum Leirvík er arbeiðsvegurin tikin burtur, og grótrúgvan eru seld til samtakið, sum gjørdi nýggja vegin.

Landsverk fer framyvir at eiga og hava ábyrgd av vegnum í Leirvík fram til bummin, sum verður nýttur til at steingja tunnilin við. Endalig avtala er tó ikki gjørd við Landsverk um yvirtøku av vegnum. Tað lendið, sum Norðoyatunnilin eigur, og sum nú er ein partur av nýggja vegnum, keypir Landsverk frá Norðoyatunlinum. Framyvir fer Norðoyatunnilin at eiga nakað av lendi runt portalin í Leirvík og lendið undir tí partinum av gamla vegnum, sum ikki verður brúkur longur. Eingin avtala er gjørd, hvørki við Eysturkommunu ella Landsverk, um, hvat skal henda við "gamla" vegnum til Norðoyatunnilin, sum ikki verður nýttur longur. Forðingar eru settar upp, so at eingin sleppur inn á hendan vegin.

Í 2012 eru nakrar rættingar gjørdar viðvíkjandi stýring av viftum og bummum. Vifturnar í Norðoya-tunlinum koyra sera nógv, og hetta viðførir nógv slit og aðrar trupulleikar. Vit eru byrjað at halda eyga við tí natúrliga trekkinum í tunlinum, og um vifturnar koyra samsvarandi tí natúrliga trekkinum. Frá 1. okt. 2012 til 1. febr. 2013 koyrdu vifturnar í Norðoyatunlinum í alt 5140 tímar. Í sama tíðarskeiði koyrdu vifturnar í Vágatunlinum 157 tímar.

Í apríl 2012 var aftur ein leki á pumpuleidninginum. Sambært tilbúgvingarætlanini, so skal NTU seta seg í samband við KJ Hydraulik, sum síðan stendur fyri øllum arbeiðinum í sambandi við umvæling-ina. Í semjuni millum NTU og NCC viðvíkjandi pumpuleidninginum varð avtalað, at garantiurin bleiv longdur, soleiðis at hann altíð er galdandi í 5 ár frá síðst, at ein leki er staðfestur.
Pumpuverkið í Norðoyatunlinum hevur koyrt gott. Vatnnøgdin, sum verður pumpað úr tunlinum, hevur verið støðug síðani síðsta leka, tó eitt sindur skiftandi í mun til árstíðina. Nøgdin liggur millum 1450 og 1650 tons um samdøgrið.

Í mars 2013 fer SWECO at kanna loftið í Norðoyatunlinum. SWECO ger eina frágreiðing fyri eftirlitið, og út frá hesi er ætlanin at bjóða arbeiðið út. Hetta arbeiðið kemur at umfata skróting, bolting og møguliga tetting av lekum.

Í 2013 er eisini ætlanin at gera kunstverkið hjá Trónda Patursson av nýggjum, og LED-projektørar skulu nýtast.

Ætlanin er at hava eina brunavenjing í Norðoyatunlinum í 2013.

Frá statusdegnum til í dag eru ikki hendingar, sum vit meta kunnu hava møguliga ávirkan á komandi ársroknskap.

## 2.2 Fígging

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Av fíggingini vóru við árslok 2012 59,3 mió. kr. eftir at gjalda niður. Skuldin við árslok 2011 var 75,5 mió. kr. Felagið hevur í 2012 rindað 3,3 mió. kr. í rentu og rindað avdráttir uppá 16,3 mió kr., svarandi til 3 avdráttir.

Sambært lániskjalinum skuldi restskuldin verið 82,0  mió. kr. Men av tí at felagið hevur havt eitt gott gjaldføri seinnu árini, hevur felagið plaserað peningin á lánið, tí mett er at vit á henda hátt fingu bestu rentuna.  Við at gjalda eykagjøld á lánið, hevur felagið goldið avdráttir fram til des. 2014.

## 2.3 Ferðsla, nýtslugjald og gjaldstøð

Í dag eru seks av oyggjunum knýttar saman við byrgingum, brúgv og undirsjóvartunlum.Sambært hagtølum frá Hagstovuni, búðu á hesum oyggjum í nov. 2012  41.957 fólk. Samlaða fólkatalið var 48.119. Sostatt eru 86,6% av íbúgvunum í Føroyum samanbundnir við vegsambandi.

Í talvuni niðanfyri hava vit eisini nevnt ferðafólkatalið, sum fór um flogvøllin. Hesi hava stóran týdning fyri ferðsluna í Vágatunlinum.



Samanbindur 86,6% av íbúgvunum

| | |
|---|---|
| Fólkatal: | |
| Streymoy | 22.302 |
| Eysturoy | 10.656 |
| Vágar | 3.051 |
| Norðoyggjar | 5.667 |
| Í alt | 41.957 |
| | |
| Aðrar oyggjar | 6.443 |
| Íbúgvar íalt nov. 2012 | 48.119 |
| | |
| Ferðafólk um Flogvøllin | 225.532 |

Ferðslan hevur í 2012 verið  í miðal 2042 akfør/samdøgur,  í mun til 1993 akfør/samdøgur í 2011.

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu ferðslan er deild yvir árið og hvat miðalferðslan hevur verið einstøku mánaðirnar  frá 2007 til 2012.




Mynd 1. Miðalferðsla pr.  dag

Á næstu mynd er víst indeks fyri ferðsluna síðan tunnilin lat upp 29. apríl 2006, og hvussu gongdin í miðalgjaldinum fyri hvørt akfar hevur verið (2006 er sett til 100). Ferðslan fyri 2006 er mett ferðsla fyri alt árið, av tí at tey faktisku tølini einans eru fyri gott 8 mánaðir.




Mynd 2. Index fyri umsetning pr. akfar og fyri ferðslu frá 2006 til 2012

Gongdin vísur at samlaða ferðslan er nakað størri í mun til árið fyri, men at tey, ið gera nýtslu av tunlinum, gjalda eitt sindur minni fyri hvønn túrin.

Samlaða ferðslan síðan tunnilin opnaði, sæst niðanfyri:

| Ár | Akfør | Prosent broyting |
|---|---|---|
| | | |
| **2006** | 448.884 | |
| **2007** | 662.828 | 47,7% |
| **2008** | 694.398 | 4,8% |
| **2009** | 698.460 | 0,6% |
| **2010** | 707.202 | 1,3% |
| **2011** | 727.316 | 2,8% |
| **2012** | 747.368 | 2,8% |

Mynd 3: Árlig ferðsla og broyting í mun til árið fyri. Tunnilin lat upp 26. apríl 2006, tí so stórur vøkstur frá 2006 til 2007.




Mynd 4. Tal av akførum, sum hava koyrt gjøgnum tunnilin frá 2006 til 2012. Árini 2004, 2005 og partvís 2006 vísa, hvussu nógv fóru um fjørðin við ferju.

Tað skal viðmerkjast, at ferðslutølini fyri 2006 eru frá 29. apríl 2006, tá tunnilin opnaði. Sostatt eru 8 mánaðir taldir við í 2006. Tølini fyri 2004, 2005 og partvís 2006 eru tøl tá ferjan sigldi.

1.januar 2012 lækkaðu prísirnir á kubbahaldum  við millum 8% - 10%.  Í roknskapinum sæst hetta aftur við at inntøkurnar frá gjøldum eru lækkaðar við 1,2 mió. kr.

Miðalprísurin, sum hvørt akfar hevur goldið, broyttist nakað tey fyrstu árini, men er síðan 2008, tá miðalprísurin var kr.  73,40, ikki broyttur munandi. Í  2009 var prísurin kr. 76,40 í miðal, kr.  71,50 í 2010, kr. 74,60 í  2011 og í 2012  er miðalprísurin lækkaður til kr. 68,91.  Teir nevndu prísirnir eru teir, ið skuldskrivað verður, tá koyrt verður framvið gjaldstøðini. Hetta gevur ein miðalprís í 2012 á kr. 34,46 hvønn vegin.




Mynd 5. Miðalgjald  pr. akfar í frá 2006 til 2012.

Arbeiðið  við at betra innkrevjingina og gera hana meiri smidliga og tíðarhóskandi fyri kundarnar, byrjar í mars 2013. Hetta er ein dagføring av verðandi gjaldskipan, sum hevur verið í nýtslu síðan tunnilin lat upp.

Gjaldsskipanin er ein felags skipan við P/F Vágatunnilin, men er soleiðis háttað, at klárt mark er millum fíggjarligu viðurskiftini hjá feløgunum.

## 2.4 Heilsa, trygd og umhvørvi

Sum partur av støðuga arbeiðinum við at halda trygdina á einum høgum støði, verður tunnilin støðugt kannaður og hevur hetta ført til eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði. Fyri at darva ferðsluna sum minst og fyri at fasthalda trygdina, er gjørt av, at tá arbeitt verður á vegbreytini verður tunnilin stongdur og arbeitt verður um náttina. Tó verða bilar leiddir gjøgnum tunnilin annanhvønn tíma.

Eitt krav frá myndugleikunum er, at tilbúgvingarætlan fyriliggur. Tilbúgvingarætlanin er gjørd í samstarvi við allar partar sum kunnu hugsast verða ein liður í hjálpararbeiðinum, um óhapp er í tunlinum. Tað verði seg sløkkilið, sjúkrahús, løgregla, Landsverk, Brunaumsjón Landsins o.o.

Ein størri venjing verður væntandi í 2013. Smærri venjingar, skipaðar av lokalu brandmyndugleikunum, hava verið í tunlinum í 2012.

## 2.5 Frí ferðsla

Eins og undanfarin ár var avtala gjørd um, at ársdagarnar, tá ávikavist Norðoyatunnilin og Vágatunnilin lótu upp fyri ferðslu, skal einki nýtslugjald latast tá koyrt verður, tó verða hesir dagar lagdir til nærmasta leygardag. Umframt ársdagarnar eru 2 dagar lagdir í samráð við handilsfelagið í økinum. Dagarnir við fríari ferðslu hava stuðlað upp undir, at vinnan og áhugabólkar í Norðoyggjunum hava skipað fyri serligum tiltøkum, eins og kunnleikin til tunnilin og áhugin fyri at ferðast er øktur.

Teir dagar frítt varð at koyra, koyrdu íalt 20.852 í 2012. Undanfarin ár hevur ferðslan verið 19.510 akfør í 2011, 20.994 í 2010, 21.660 í 2009, 23.764 í 2008 og 30.486 akfør í 2007

## 2.6 Skipan av rakstri

Raksturin hjá felagnum er skipaður við innanhýsis virksemi - sum fevnir um leiðslu felagsins og innkrevjing av nýtslugjaldi, og við uttanhýsis tænastuavtalum, sum fevna um tekniska raksturin av tunlinum og gjaldstøðini.

Avtalað er við P/F Vágatunnilin um felags rakstur, útreiðslurnar verða býttar javnt millum feløgini, tó soleiðis, at serstakar útreiðslur, ið hoyra øðrum felagnum til, verða goldnar av hesum.

# 3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina.

# 4. Rakstraræltlan fyri 2013

Høvuðstølini í rakstraræltlanini fyri 2013 eru víst niðanfyri.

| **Rakstur** | **mió kr** |
|---|---|
| Umsetningur | 26,0 |
| Rakstur tunnil og vegir | -6,7 |
| Rakstur innkrevjing | -2,5 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 16,8 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -11,3 |
| Fíggjarpostar | -2,5 |
| **Ársúrslit** | 3,0 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 11,3 |
| Avdráttur | -10,5 |
| **Likviditetsavlop** | 3,8 |

Bert smærri íløgur hava verið í 2012.

Støðisognin er við árslok uml. 297,3 mió. kr.. Ávísar íløgur skulu væntast í 2013.

NORÐOYATUNNILIN

## 5. Niðurstøða

Samanumtikið kann staðfestast:

- At úrslitið hjá felagnum gjørdist betri enn  tað sum varð ásett í ætlanini fyri 2012
- Prísirnir fyri kubbahald eru lækkaðir
- Prísbygnaðurin er eins fyri Vágatunnilin og Norðoyatunnilin
- El-teknisku installatiónirnar dagførdar

Tórshavn 19. mars 2013

Jens Kári Vilhelm,formaður

Heri M. Hammer, næstformaður

Jóhanna á Bergi, nevndarlimur

/ Uni Danielsen, stjóri